# VILT TÚ SETA TEG Á OVASTU RÓK

## Í EINARI AV VÆLRIKNU FYRITØKUNUM Í FØROYUM

Løvubetong varð stovnað í 1973. Í dag er Løvubetong størsti framleiðari av betong í Føroyum. Harumframt selur felagið cement til aðrar betongframleiðarar og asfaltframleiðarar. Í løtuni starvast 9 fólk hjá Løvubetong

Í december 2006 keypti Thor Contractors Løvubetong. Eigararnir av Thor Contractors, sum er úr Íslandi, eru sterkir aktørar í íslendsku byggivinnuni.

Einingaverksmiðjan (EV), sum framleiðir betongelementir í Íslandi, er partur av Thor Contractors samtakinum. Í EV starvast í dag áleið 80 starvsfólk við hollum kunnleika til at framleiða betongelementir til m.a. íbúðar-, kontór-, og ídnaðarbygningar.

Fleiri upplýsingar um EV finnast á heimasíðu felagsins: www.ev.is

Familjan Mørkøre hevur rikið Løvubetong síðani tað varð stovnað, men nú er stundin komin, at tey ynskja at fáa betri stundir til eisini at røkja onnur áhugamál.

Leitað verður tí eftir einum framfýsnum, ábyrgdarfullum og dugnaligum persóni til starvið sum stjóri í P/F Løvubetong.

**Starvið**
Stjórin hevur ábyrgdina av dagligu leiðsluni av Løvubetong við tilvísing til nevndina.

Stjórin fær somuleiðis til uppgávu í samstarvi við Einingaverksmiðjuna at standa fyri byggingini av einum framleiðsluvirki við Norðskála, sum skal framleiða betongelementir. Ætlandi verða 15 til 20 starvsfólk knýtt at hesi framleiðslu.

Eitt starv í einum samtaki sum Thor Contractors kann fyri tann rætta persónin eisini skapa møguleikar fyri, at hann sleppur at royna seg í Íslandi, um áhugi er fyri tí.

Lønin verður ásett eftir nærri avtalu.

**Umsøkjarin**
Dentur verður lagdur á, at umsøkjarin:

- hevur hollan ástøðiligan og praktiskan kunnleika til byggi-, vinnu- og búskaparlig viðurskifti í Føroyum
- hevur góð samstarvsevni og leiðsluroyndir
- dugir at arbeiða sjálvstøðugt
- dugir at málbera seg í skrift og talu (á føroyskum og enskum)

**Umsóknir**
Umsókn saman við prógvum, viðmælum v.m. skal sendast til **Rasmussen & Weihe, statsaut. revisorar, postboks 30, FO-110 Tórshavn** í seinasta lagi mánadagin 26. mars 2007.

Fleiri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Bjarna Arnason á telefon (+298) 351 700.

Allar upplýsingar og umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.



## Hýruvognsloyvi

Í Tórshavnar kommunu eru trý hýruvognsloyvi leys at søkja.

Vísast skal á, at sambært grein 8 í reglugerðini um hýruvognsstøðir í Tórshavnar kommunu, skulu umsøkjarar hava váttan fyri, at teir koma at koyra frá støð. Loyvini eru tengd at bilstøðini Bil.

Umsóknarblað fæst í Snarskivuni og á www.torshavn.fo. Umsóknir skulu vera Tórshavnar kommunu, postsmoga 32, FO-110 Tórshavn í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 30. mars 2007.

**Tórshavnar kommuna**

# Íbúð til sølu

Um nøktandi boð fæst, verður stór íbúð í gerð í vesturbýnum seld.

**Ring 510542**

**Hvønn dag í mars mánaða verða Sudoku uppgávur at finna í Sosialinum.**

**Jú fleiri uppgávur, ið tú hevur loyst, tess størri møguleika hevur tú at vinna.**

**Sendið okkum loysnina innan fríggjadagin 6. apríl 2007 kl. 10.00 og viðmerkið brævbjálvan »Sudoku«.**

**Vinningur í mars er 2 M-semiflex flogferðaseðlar við Atlantic Airways. Virði Kr. 6.304,-**

**Drigið verður fyrstu vikuna í apríl.**

**Fyri at vera við í kappingini, skal øll uppgávan verða loyst.**



# SUDOKU

## MARS-KAPPINGIN

| | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 8 | 6 | | | | 1 | 9 | | |
| | 4 | | | | 3 | 8 | | |
| | | | 9 | | | 3 | | |
| 9 | | | | 1 | 6 | | | |
| | | | | | | | | |
| | | | 5 | 3 | | | | 2 |
| | | 5 | | | 4 | | | |
| | | 7 | 3 | | | | 8 | |
| | | 2 | 7 | | | | 6 | 3 |

ATLANTIC AIRWAYS

**Navn:** ______________________

**Bústaður:** ______________________

**Telefon:** ______________________

Sendið til: Sosialin · Boks 76 · 110 Tórshavn
Merkið brævbjálvan »Sudoku«

## Vinningurin í mars

2 M-semiflex ferðaseðlar frá Atlantic Airways. **Virði Kr. 6.304,-**

Sosialurin